# Skúla**bygnaður og** skúla**bygningar**

## Tørvslýsing miðstaðarøkið

**Tórshavnar kommuna**

**September 2013**

## Inngangur

Í november 2011 varð álit við uppskoti til nýggjan skúlabygnað fyri Tórshavnar kommunu skrivað.[1] Bakstøðið var tann framhaldandi íløgutørvurin hjá kommununi í skúlar og ásannan av, at skúlabygnaðurin hevur ávirkan á hølistørvin og harvið eisini íløgutørvin.

Eftir viðgerð í arbeiðsbólki umboðandi øll skúlastýri í kommununi[2] og tilmæli frá øðrum arbeiðsbólki um konsept fyri nýggjum Vesturskúla[3] samtykti Tórshavnar býráð 28. juni 2012 uppskotið til nýggjan skúlabygnað.

Høvuðslinjurnar í uppskotinum til skúlabygnað vóru m.a., at talið av sporum (flokkum) í høvuðsstaðarskúlunum skuldi verða 13 í 1.-6. flokki og 14. í 7.-9 flokki, og at Venjingarskúlin og Kommunuskúlin skuldu leggjast saman í ein nýggjan trý-sporaðan Vesturskúla.

Landsstýrismaðurin í mentamálum boðaði í skrivi dagfest 19. februar 2013 frá, at Mentamálaráðið í løtuni arbeiðir við broytingum í fólkaskúlabygnaðinum, so at tímar í størri mun verða tillutaðir til skúlaøki og lagað eftir næmingatalinum í hvørjum árgangi, og meðan arbeitt verður við hesum, fer Mentamálaráðið ikki at góðkenna uppskotið hjá Tórshavnar kommunu til nýggjan skúlabygnað.

Umsiting og býráð hava síðani viðgjørt málið av nýggjum. Á fundi 26. juni 2013 samtykti býráðið at fáa til vega eina tørvslýsing fyri ein Miðbýarskúla og Vesturskúla at leggja fyri býráðið í seinasta lagi 15. september 2013.

Omanfyri nevnda uppskot hevði sum grundstøði ein samanhangandi skúlabygnað fyri alla kommununa, tó við serligum denti á høvuðsstaðarøkið. Henda tørvslýsing fevnir serliga um støðuna í miðstaðarøkinum, sum í hesum føri er Tórshavnar býur.

Við støði í tørvslýsingini eru uppskot til skúlaloysn fyri miðstaðarøkið, sum við hesum verða latin til politiska viðgerð.

Jóan Petur Hentze

Trivnaðarstjóri

[1] *Fólkaskúlin í Tórshavnar kommunu árini 2012-2021*, Tórshavnar kommuna, 15. november 2011, j.nr. 2011-0679/2

[2] *Niðurstøður frá arbeiðsbólkinum, sum hevur viðgjørt álitið um skúlabygnað og skúlabygging 2012-2021*, Tórshavnar kommuna, 2. apríl 2012, j.nr. 2011-0679/19

[3] *Niðurstøður frá arbeiðsbólkinum, sum hevur viðgjørt uppskotið um nýggjan skúla í vesturbýnum*, Tórshavnar kommuna, 22. juni 2012, j.nr. 2012-1064/7

# 1. Grundarlag undir tørvslýsingini

## 1.1. Broytingar í fólkaskúlabygnaðinum

Í sambandi við tørvslýsingina hevur fundur verið við Mentamálaráðið til tess at fáa nærri kunning um ætlanir ráðsins at broyta fólkaskúlabygnaðin, so sum fráboðað í skrivi ráðsins dagfest 19. februar 2013 og seinni eisini í seinastu ólavsøkurøðu løgmans.

Á fundinum kom fram, at landsstýrismaðurin í mentamálum fer at seta arbeiðsbólk at gera uppskot til nýggjan fólkaskúlabygnað.

Sambært arbeiðssetninginum hjá arbeiðsbólkinum, so fer fólkaskúlin framvegis at verða ein landsuppgáva, men lagt verður aftrat sum ynskiligt, at sum mest av avgerðarheimildunum hjá Mentamálaráðnum verða miðfirraðar til ein hóskandi skúlaleiðslubygnað uttanfyri ráðið.

Hvussu hetta skal gerast ítøkiliga í mun til skipan av skúlaøkjum kring landið, hvør skal hava heimildina at býta tímajáttanina í økjunum út á einstøku skúlarnar, og hvussu skúlaleiðslubygnaðurin í t.d. Tórshavnar kommunu skal síggja út, er ikki greitt – hetta er partur av uppgávuni hjá arbeiðsbólkinum at gera tilráðingar til landsstýrismannin um.

Men í útgangsstøðinum eru bert tveir møguleikar, um so er, at avgerðarheimildir veruliga skulu miðfirrast. Antin er tað yvirskipað kommunan sum skúlamyndugleikin á staðnum, ið fær hesar heimildir, ella er tað ein skúlaleiðsluskipan beinleiðis undir landsstýrismanninum. Í verandi skipan eru skúlastjórar settir beinleiðis av landsstýrismanninum.

Undir øllum umstøðum tykist tó vera greitt, at fíggingin til fólkaskúlaundirvísing í framtíðini verður beinleiðis knýtt at næmingatalinum og tí ikki talinum av flokkum. Sambært fólkaskúlalógini § 20 eigur við skúlaársbyrjan næmingatalið vanliga ikki at fara uppum 24 í hvørjum flokkinum.

Sum tað eisini verður gjørt greitt í skrivinum frá Mentamálaráðnum 19. februar 2013, so verður tað eisini framvegis kommunan, ið skal gera av, hvørjir skúlabygningar skulu nýtast ella byggjast til endamálið, men tá peningurin fylgir næminginum, so fæst mest burturúr fíggjarorkuni við at hava flokkar við nógvum næmingum.

Hetta er í veruleikanum støðan longu nú. Praksis hjá Mentamálaráðnum er nú tann, at um t.d. tríggir næmingar skuldu komið aftat í ein flokk, sum hevur 25 næmingar, so játtar Mentamálaráðið ikki tímar til flokkar aftrat um so er, at pláss er í øðrum flokkum í høvuðsstaðarøkinum. Hetta eigur samlaði skúlabygnaðurin hjá kommununi at taka hædd fyri.

Leggjast kann aftrat, at síðstu árini eru fleiri royndir gjørdar við fleirlæraraundirvísing í samanløgdum flokkum við upp til 50 næmingum, eitt nú í Skúlanum við Løgmannabreyt, har flokshølini eru dupultstovur. Slík skipan hevur tó ikki stórvegis ávirkan á samlaða

hølistørvin ella gagnnýtsluna av tímajáttanini, men er í høvuðsheitum at meta sum ein annar undirvísingarháttur.

## 1.2. Næmingatøl

Partur av fyrireikingunum til hesa tørvslýsing hevur verið at fáa til vega nýggjar framrokningar av fólkatalinum í kommununi komandi 30 ára skeiðið við serligum denti á aldursbólkarnar 0-16 ár. Hesa hevur Hagstova Føroya útvegað kommununi.[4] Endamálið við framrokningini er at fáa betri mynd av hølistørvinum komandi árini, serliga í mun til talið av flokkum fyri hvønn árgangin. Nærri um hesa framrokning í kap. 2.

Í øðrum sambandi, nevniliga sum íkast til arbeiðið við miðbýarætlanina hjá kommununi, hevur Umhvørvisstovan við støði í bústaðaskránni og landsfólkayvirlitinum latið gera eina samanteljing av ymsu aldursbólkunum, sum búgva í miðbýnum og øðrum pørtum av høvuðsstaðarøkinum. Tøl úr hesi samanteljing verða eisini nýtt í hesi tørvslýsing, sí kap 2.1.

## 1.3. Skúlabygnaður og skúlabygningar

Tørvslýsingin í mun til væntaðu tølini fyri næmingar og flokkar komandi 30 árini og fólkasamanseting annars skal so knýtast til støðuna við verandi høliskapasiteti og møguligum tørvi á nýggja skúlabygging.

Fortreyt fyri haldgóðari skúlaloysn, sum er framtíðartryggjað eisini í mun til íløgukostnað, er ein yvirskipaður skúlabygnaður fyri alla kommununa. Av tí, at umbidna tørvslýsingin er avmarkað til miðstaðarøkið, er denturin fyrst og fremst lagdur á skúlarnar í sjálvum Tórshavnar býi – tvs. Eysturskúlan, Sankta Frans skúla, Kommunuskúlan og Venjingarskúlan, umframt Vesturskúlan, sum nevndur er í býráðssamtyktini.

Skúlin á Argjahamri hevur tó eisini týdning í hesum sambandi, tí ein betri gagnnýtsla av høliskapasitetinum á Argjahamri ávirkar hølistørvin í miðstaðarøkinum. Í hesum sambandi hava teir báðir skúlarnir í Hoyvík ikki eins stóra ávirkan. Ein framtíðarstaðseting av Nám X hevur eisini týdning fyri heildarmyndina.

Í sambandi við hølistørv er eisini umráðandi at taka hædd fyri hølum til flokkar til børn við serligum avbjóðingum. Í løtuni eru tvey slík skúlatilboð í kommununi, har annað er í Venjingarskúlanum. Metast má, at so hvørt sernámfrøðiligu tilboðini økjast og betrast, verður hesin tørvur at hava flokkar í sjálvum fólkaskúlanum eisini at vaksa.

---

[4] *Stokastisk framrokning av fólkatalinum í Tórshavnar kommunu 2012-2041*, Hagstova Føroya, 5. september 2013

## 1.4. Forskúli og frítíðarskúli

Í álitinum um skúlabygnað frá 2011 var uppskot at skipa heildarskúla soleiðis, at hvør skúli hevur forskúla og frítíðarskúla í skúlabygninginum.

Sambært tørvskanning,[5] ið Gallup Føroyar hevur útvegað kommununi í mai 2013, er tørvur á fleiri forskúlatilboðum í kommununi. Í dag er bert tað eina tilboðið í Sankta Frans skúla við tveimum flokkum. Tørvskanningin vísir, at støðutakan hjá foreldrum til forskúlatilboð er treytað av, um forskúli er í sama skúla, sum tey ætla, at barnið skal ganga í vanliga skúla.

Hølistørvur til forskúla í øllum skúlum eigur tí at verða tikin við í skúlaloysnina fyri miðstaðarøkið.

Í báðum skúlunum í Hoyvík og í Skúlanum á Argjahamri er frítíðarskúlin bygdur sum partur av skúlanum. Á sama hátt er við frítíðarskúlanum til forskúlan hjá Sankta Frans skúla.

Hinvegin hava allir skúlarnir í miðstaðarøkinum – Eysturskúlin, Sankta Frans skúli, Kommunuskúlin og Venjingarskúlin, ikki frítíðarskúla til 1. og 2. flokk sum part av skúlabygninginum, men eru skipaðir uttanfyri skúlabygningin í ymsum fyribilsloysnum.

Verða fleiri forskúlatilboð skipað í kommununi sum heild, verður hetta at hava ávirkan á hølistørvin á dagstovnaøkinum serliga í sjálvum høvuðsstaðarøkinum. Roknast skal við, at dagstovnaøkið verður at minka í tali av børnum og stovnum. Hinvegin vil eitt størri útboð av forskúlatilboðum vaksa um hølistørvin hjá frítíðarskúlunum, tá tey seks ára gomlu eisini skulu hava frítíðarskúlatilboð.

Serliga í mun til frítíðarskúlaøkið liggur sum er ein stórur íløgutørvur fyri framman. Metast má fyrimunur í mun til at tálma samlaða íløgukostnaðin, at skúlaloysn fyri miðstaðarøkið eisini fevnir um frítíðarskúla frá forskúlaflokki til 2. flokk í skúlabygninginum.

Eru forskúli og frítíðarskúli í skúlabygninginum eru betri fortreytir at menna fakliga samstarvið millum námsfrøðingar og lærarar um børnini, og sum eisini má metast at verða skilagóð politisk stevna hjá kommununi. Trivnaðarliga má hetta metast eisini at vera fyrimunur hjá børnunum.

[5] *Tørvskanning á barnaansingarøkinum hjá Tórshavnar kommunu*, Gallup Føroyar, mai 2013

## 2. Næmingatøl

Tórshavnar kommuna hevur heitt á Hagstovu Føroya gera framrokning, hvussu fólkatalið sær út í kommununi tey næstu 30 árini, tó serliga við atliti at aldursbólkinum 0-16 ár.

Samanumtikið verður roknað við einum lítlum vøkstri í fólkatalinum í Tórshavnar kommunu næstu 30 árini. Framrokningin vísir, at í árinum 2032 fer talið upp um 21.000 íbúgvar, men stavar vøksturin í høvuðsheitum frá talinum av pensjónistum.

Framrokningin vísir somu samlaðu fertilitetsratu á 2,5 barn, men kvinnurnar eru yvirhøvur eitt sindur eldri, tá tær fáa børnini. Henda myndin verður tann sama framyvir.

Minkingin síðstu árini í aldursbólkinum 0-6 ár heldur fram til 2015, men hækkar so aftur til eina fasta legu á 1.900 fólk frá 2018 at rokna, tvs. umleið 270 børn fyri hvønn árgangin.

Aldursbólkurin 7-15 ár heldur fram at minka til 2020, tá talið leggur seg støðugt á umleið 2.500 fólk, tvs. umleið 275 børn fyri árgangin. Hesi tøl verða í frágreiðingini greinaði sundur soleiðis, at framrokningar eru gjørdar fyri hvønn einstakan aldursbólk 0-16 ár árini 2012-2041. Tess longri áramál fram í tíðina, tess størri gerst óvissan í tølunum.

Arbeiðsstyrkin, sum er aldursbólkurin 16-66 ár, verður stórt sæð tann sama, nevniliga 12.800 fólk, fram til 2024, tá hon fer at minka spakuliga.

Talið av pensjónistum veksur við 100 fólkum um árið til 2032, tá vøksturin verður minkandi aftur.

Hesi tøl fevna um alla kommununa.

### 2.1. Næmingatøl býtt á aldursbólkar

Við støði í omanfyri nevndu framrokning vísir talvan niðanfyri talið av næmingum í kommununi býtt á aldursbólkar/flokkar fram til árið 2025.

Talva 1: Næmingatøl sambært framrokning 2013-2025

| | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | | | | | | | | |
| 6 ár, 0.fl | 293 | 282 | 248 | 242 | 249 | 274 | 275 | 274 | 272 | 274 | 275 | 275 | 273 |
| 7 ár, 1.fl | 257 | 293 | 282 | 249 | 243 | 250 | 275 | 275 | 274 | 273 | 275 | 274 | 276 |
| 8 ár, 2.fl | 310 | 260 | 297 | 285 | 252 | 246 | 254 | 279 | 277 | 279 | 277 | 277 | 278 |
| 9 ár, 3.fl | 289 | 310 | 261 | 297 | 286 | 252 | 247 | 254 | 279 | 278 | 279 | 277 | 279 |
| 10 ár, 4.fl | 289 | 291 | 312 | 263 | 299 | 288 | 254 | 247 | 255 | 281 | 280 | 282 | 278 |
| 11 ár, 5.fl | 341 | 289 | 291 | 312 | 263 | 299 | 287 | 254 | 248 | 256 | 281 | 280 | 281 |
| 12 ár, 6.fl | 270 | 343 | 291 | 293 | 315 | 265 | 301 | 291 | 257 | 250 | 258 | 283 | 282 |
| 13 ár, 7.fl | 320 | 270 | 342 | 290 | 292 | 314 | 264 | 301 | 289 | 256 | 250 | 257 | 283 |
| 14 ár, 8.fl | 310 | 320 | 269 | 342 | 289 | 291 | 313 | 264 | 300 | 288 | 255 | 249 | 257 |
| 15 ár, 9.fl | 297 | 310 | 319 | 269 | 341 | 289 | 291 | 312 | 263 | 299 | 288 | 255 | 248 |
| 16 ár, 10.fl (65%) | 179 | 188 | 195 | 201 | 168 | 215 | 181 | 183 | 197 | 164 | 189 | 181 | 159 |
| | | | | | | | | | | | | | |
| Næm.tal uttan 0.fl. | **2.862** | **2.874** | **2.859** | **2.801** | **2.748** | **2.709** | **2.667** | **2.660** | **2.639** | **2.624** | **2.632** | **2.615** | **2.621** |
| | | | | | | | | | | | | | |
| Næm.tal við 0.fl | 3.155 | 3.156 | 3.107 | 3.043 | 2.997 | 2.983 | 2.942 | 2.934 | 2.911 | 2.898 | 2.907 | 2.890 | 2.894 |

*Kelda: Stokastisk framrokning av fólkatalinum í Tórshavnar kommunu 2012-2041, Hagstova Føroya, 5. september 2013*

Sum sæst verður samlaða næmingatalið í kommununi millum 2.615 og 2.874 árini 2013-2025, tá er roknað við, at 65% av næmingunum fara í 10. flokk (Nám X).

Verður forskúli ella 0. flokkur tikin við – tvs. øll tey 6 ára gomlu, verður næmingatalið millum 2.890 og 3.156.

## 2.2. Tal av sporum (flokkum fyri hvønn árgang)

Við støði í omanfyri nevndu framrokning vísir talvan niðanfyri talið av næmingum í hvørjum flokki, tá 12 spor (flokkar) eru í hvørjum árgangi fram til árið 2025.

Talva 2: Tal av næmingum í hvørjum flokki við 12 sporum

| **12 spor** | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | | | | | | | | |
| 6 ár, 0.fl | 293 | 282 | 248 | 242 | 249 | 274 | 275 | 274 | 272 | 274 | 275 | 275 | 273 |
| næm.tal | 25 | 24 | 21 | 21 | 21 | 23 | 23 | 23 | 23 | 23 | 23 | 23 | 23 |
| 7 ár, 1.fl | 257 | 293 | 282 | 249 | 243 | 250 | 275 | 275 | 274 | 273 | 275 | 274 | 276 |
| næm.tal | 22 | 25 | 24 | 21 | 21 | 21 | 23 | 23 | 23 | 23 | 23 | 23 | 23 |
| 8 ár, 2.fl | 310 | 260 | 297 | 285 | 252 | 246 | 254 | 279 | 277 | 279 | 277 | 277 | 278 |
| næm.tal | 26 | 22 | 25 | 24 | 21 | 21 | 22 | 24 | 24 | 24 | 24 | 24 | 24 |
| 9 ár, 3.fl | 289 | 310 | 261 | 297 | 286 | 252 | 247 | 254 | 279 | 278 | 279 | 277 | 279 |
| næm.tal | 25 | 26 | 22 | 25 | 24 | 21 | 21 | 22 | 24 | 24 | 24 | 24 | 24 |
| 10 ár, 4.fl | 289 | 291 | 312 | 263 | 299 | 288 | 254 | 247 | 255 | 281 | 280 | 282 | 278 |
| næm.tal | 25 | 25 | 26 | 22 | 25 | 24 | 22 | 21 | 22 | 24 | 24 | 24 | 24 |
| 11 ár, 5.fl | 341 | 289 | 291 | 312 | 263 | 299 | 287 | 254 | 248 | 256 | 281 | 280 | 281 |
| næm.tal | 29 | 25 | 25 | 26 | 22 | 25 | 24 | 22 | 21 | 22 | 24 | 24 | 24 |
| 12 ár, 6.fl | 270 | 343 | 291 | 293 | 315 | 265 | 301 | 291 | 257 | 250 | 258 | 283 | 282 |
| næm.tal | 23 | 29 | 25 | 25 | 27 | 23 | 26 | 25 | 22 | 21 | 22 | 24 | 24 |
| 13 ár, 7.fl | 320 | 270 | 342 | 290 | 292 | 314 | 264 | 301 | 289 | 256 | 250 | 257 | 283 |
| næm.tal | 27 | 23 | 29 | 25 | 25 | 27 | 22 | 26 | 25 | 22 | 21 | 22 | 24 |
| 14 ár, 8.fl | 310 | 320 | 269 | 342 | 289 | 291 | 313 | 264 | 300 | 288 | 255 | 249 | 257 |
| næm.tal | 26 | 27 | 23 | 29 | 25 | 25 | 27 | 22 | 25 | 24 | 22 | 21 | 22 |
| 15 ár, 9.fl | 297 | 310 | 319 | 269 | 341 | 289 | 291 | 312 | 263 | 299 | 288 | 255 | 248 |
| næm.tal | 25 | 26 | 27 | 23 | 29 | 25 | 25 | 26 | 22 | 25 | 24 | 22 | 21 |

*Kelda: Stokastisk framrokning av fólkatalinum í Tórshavnar kommunu 2012-2041, Hagstova Føroya, 5. september 2013*

Sambært hesum er greitt, at tað er nóg mikið við 12 sporum í hvørjum árgangi frá 1.-7. flokki í høvuðsstaðarøkinum.

Tó at tað í summum førum tykist verða hægri miðaltal av næmingum í flokkunum fyri hvønn árgang enn fólkaskúlalógin vanliga ásetir – nevniliga 24 næmingar, so skal havast í huga, at í hvørjum árgangi eru millum 20-25 næmingar í skúlunum á bygd og í frískúlunum. Ikki fyrr enn hesi koma í høvuðsstaðarskúlarnar at ganga í 8. og 9. flokki, verður neyðugt við 13 sporum.

Hetta skal samanberast við, at í høvuðsstaðarøkinum í dag er høliskapasitetur til 14 spor 1.-7. flokk. Hetta svarar sostatt til, at ein tvey sporaður fólkaskúli 1.-7. flokk kann takast úr bygnaðinum.

Býtt upp í býarpartar, so eru skúlarnir í Hoyvík og á Argjahamri til samans seks spor. Við støði í, at 12 spor er nøktandi fyri høvuðsstaðarøkið, er brúk fyri til samans seks sporum í miðstaðarøkinum 1.-7. flokk og sjey sporum 8.-9. flokk.

Í mong ár hava verið tilsamans átta spor í miðstaðarøkinum, tvs. teimum fýra skúlunum innanfyri ringvegin. Talan verður tí um at minka høliskapasitetin í miðstaðarøkinum úr átta sporum niður í seks spor.

## 2.3. Miðstaðarøkið

Nú eins og í 2011, tá arbeiðið við nýggja skúlabygnaðinum byrjaði, er politiskt ynski, at fólkaskúli framhaldandi skal vera í miðbýnum. Hetta hevur týdning fyri trivnaðin í miðbýnum og fyri tað lívið, sum í miðbýnum skal vera.

Í sambandi við miðbýaræltlanina hjá býráðnum hevur Umhvørvisstovan gjørt nakrar samanteljingar, sum lýsa, hvussu miðbýurin sær út í fólkasamanseting í mun til aðrar partar av býnum og høvuðsstaðnum annars. Miðbýur í hesum sambandi er ein radius uppá 500 metrar frá Vaglinum. Guli rundingurin á myndini niðanfyri vísir ein radius uppá 500 metrar frá Vaglinum.

Tað sæst, at rundingurin eystanfyri kemur tætt at Eysturskúlanum og vestanfyri tætt at Venjingarskúlanum. Niðaneftir er Kommunuskúlin innanfyri ringin og Sankta Frans skúli árakað hesa skilmarking av miðbýnum.

Mynd 1: Miðbýur skilmarkaður sum radius 500 metrar frá Vaglinum



Sambært tølunum hjá Umhvørvisstovuni eru lutfalsliga færri børn 0-9 ár í miðbýnum enn í restini av landinum, býnum Tórshavn og tí samlaða høvuðsstaðarøkinum Tórshavn, Argir og Hoyvík (stabbarnir yvir 1 talinum í myndini niðanfyri).

Aldursbólkurin 10-19 ár (stabbarnir yvir 2 talinum í myndini niðanfyri) vísa, at eisini í hesum aldursbólkinum eru færri børn og ung í miðbýnum enn í høvuðsstaðarøkinum annars.

At so er, er eyðsæð tengt at nýggjaru búsetingunum bæði í Hoyvík, á Argjum og í ytru pørtunum av Tórshavn. Tað sæst eisini týðiliga, at tað eru lutfalsliga fleiri barnafamiljur í hesum økjum enn í miðbýnum (stabbarnir 1-5, tvs. aldursbólkarnir 0-49 ár).

<u>Stabbamynd 1: Aldursbólkar miðbýur og onnur øki</u>




*Kelda: Umhvørvisstovan*

Um hugt verður eftir nominellu fólkatølunum, so telur aldursbólkurin 0-9 ár í miðbýnum í alt 233 børn. Samlað fyri allan Tórshavnar bý er talið 1.548. Fyri aldursbólkin 10-19 ár er talið fyri miðbýin 293, fyri allan Tórshavnar bý 1.700.

Hvørt tíggjuáraskeiðið kann sammetast við ein skúla við 10 árgangum. Við støði í hesi skilmarking av miðbýnum, tvs. innanfyri 500 metrar frá Vaglinum, kann staðfestast, at næmingatalið er á støðd við ein eitt sporaðan skúla, har tað í dag er fýra spor býtt á Sankta Frans skúla og Kommunuskúlan.

Omanfyri nevnda samanteljing hjá Umhvørvisstovuni er ein løtumynd og sigur einki um, hvørt talið av børnum í miðbýnum er vaksandi ella minkandi. Leggjast skal eisini aftrat, at henda skilmarking av miðbýnum neyvan er ein heilt røtt lýsing av veruliga tørvinum, tí bústaðarøki liggja beint uttanfyri ringin – eitt nú Gundadalur.

Men tann niðurstøða kann gerast, at nógv tey flestu børnini í verandi miðbýarskúlum Sankta Frans skúla og Kommunuskúlanum búgva ikki í sjálvum miðbýnum, so sum hann omanfyri er skilmarkaður.

Við støði í, at í aldursbólkinum 0-9 ár búgva 1.315 børn í Tórshavnar býi uttanfyri hesa skilmarking av miðbýnum, so talar fyri einum skúlabygnað fyri samlaða miðstaðarøkið, sum er meira javnt býttur út á býarpartarnar miðbýur, eysturbýur og vesturbýur.

# 3. Verandi skúlar og frítíðarskúlar

## 3.1. Skúlarnir í miðstaðarøkinum

Niðanfyri verður stutt lýst støðan hjá teimum ymsu skúlunum í mun til næmingatal og skúlabygningar. Tær kostnaðarmetingar, sum nevndar eru, eru úr álitinum frá 2011.

### Eysturskúlin

Eysturskúlin varð bygdur í tveimum byggistigum. Fyrsta byggistigið, A-bygningurin, sum er ovasti parturin í skúlanum, var liðugur í 1974. Allur skúlin var liðugur í 1980. Í skúlanum eru allar vanliga fakstovur, umframt vanligu flokshølini. Haraftrat er svimjihylur í skúlanum.

Eysturskúlin er næstan 6.000 fermetrar. Meginparturin av skúlanum er nýliga høvuðsumvældur. Seinasti partrurin, E-lonin, verður liðugt høvuðsumvæld á sumri 2014.

Eysturskúlin er tvey sporaður skúli 1.-7. flokk, og trý sporaður 8.-9. flokk. Harumframt er Nám X í E-lonini.

Skúlaárið 2013/2014 eru fýra árgangir, har pláss er fyri einum flokki aftrat. Hesir árgangirnir eru 1., 3., 6. og 8. flokkur. Fyrstu trý árini eru næmingarnir ikki býttir sundur í flokkar, men har næmingatalið í einum árgangi er omanfyri 26, er her roknað við tveimum flokkum. Miðaltalið í hvørjum flokki er 21 næmingar, tá er Nám X ikki íroknað.

Í uppskoti hevur verið at skipað Nám X sum sjálvstøðugan skúla, so sum fólkaskúlalógin í dag heimilar, og flutt Nám X úr Eysturskúlanum. Í álitinum frá 2011 varð mælt til, at Nám X varð staðsettur í miðbýnum í niðara part av verandi Kommunuskúla, tvs. í smábarnaskúlanum í Kongagøtu, realskúlanum og einum nýbygningi í garðinum hjá Frk. Cohr.

Eitt endamál við hesi staðseting var meting um, at Nám X vil verða eitt stórt aktiv fyri miðbýin, tí hetta eru 175-200 hálvvaksnir næmingar, sum kunnu nýta miðbýin og miðbýarhølini sum pall fyri einum og øðrum virksemi. Kostnaðarmeting fyri hesa loysn, at Nám X flytur inn í miðbýin, var mett til uml. kr. 25 mió.

Annar møguleiki, sum skúlastýrini mæltu til, er at flyta Nám X í nýggjara partin av Argja skúla.

Er Nám X ikki inni í Eysturskúlanum, rúmar skúlin í veruleikanum trimum sporum 1.-9. flokk. Tá er tó bert pláss fyri einum, møguliga tveimum forskúlaflokkum aftrat. Pláss er tá ikki fyri frítíðarskúla í skúlabygninginum.

### Tórshavnar kommunuskúli

Høvuðsbygningurin í Kommunuskúlanum varð tikin í nýtslu 1956. Skúlin í Kongagøtu varð tikin í nýtslu í 2005, har 1.-3. flokkur heldur til. Realskúlin er nýumvældur og verður

nú burturav nýttur til lærararúm, skrivstovur, umsiting og leiðslu. Haraftrat eru húsini hjá Frk. Cohr, har eru bólkahøli og høli til serundirvísing.

Sum fyribilssloysnir hevur skúlin harumframt skúlastovur í bingjum við Sjónleikarhúsið og í garðinum hjá Frk. Cohr, umframt at stórur partur heldur til úti í Argja skúla, tá høvuðsbygningurin varð stongdur.

Kommunuskúlin er ein tvey sporaður skúli 1.-7. flokk, og 4 sporaður skúli 8.-9. flokk. Í løtuni eru eisini tveir fótbóltsskúlaflokkar í 8.-9. flokki.

Skúlaárið 2013/2014 eru tveir flokkar í hvørjum árgangi 1.-7. flokk, og í 8. og 9. árgangi eru fýra flokkar í hvørjum árgangi. Miðalnæmingatalið í hvørjum flokki er 20,6.

Ein heildarætlan er gjørd fyri Kommunuskúlan. Tað eru Árni Winther Arkitektar, sum hava gjørt hana. Heildarætlanin tekur støði í, at Kommunuskúlin framyvir verður ein tvey sporaður skúli við næmingum í 1.-9. flokki. Eftir henni verður høvuðsbygningurin høvuðsumvældur, dagførdur og útbygdur, bygningurin hjá Frk. Cohr verður tikin niður, og nýggjur skúlabygningur bygdur í garðinum.

Kostnaðarmeting fyri heildarætlanina er uml. kr. 120 mió. Í heildarætlanini rúmast tó ikki forskúli og heldur ikki frítíðarskúli. Tað er trongligt á økinum við Kommunuskúlan, so útbyggingarmøguleikarnir eru avmarkaðir.

### Venjingarskúlin

Skúlin varð tikin í nýtslu í august 1968. Í 1991 varð ein lon bygd aftrat skúlanum. Hesa lon eigur Tórshavnar kommuna einsamøll, meðan restin av bygninginum er felagsogn við landsstýrið. Áður hevði Venjingarskúlin beinleiðis tilknýti til lærarútbúgvingina sum venjingarskúli, men í nógv ár hevur Venjingarskúlin verið vanligur fólkaskúli.

Umframt høvuðsbygningin hoyra Ytri skúli, sum varð bygdur í 1961, og Heimari skúli, sum varð bygdur í 1965 til Venjingarskúlan. Í hesum báðum skúlabygningunum halda yngstu flokkarnir til.

Venjingarskúlin er tvey sporaður skúli 1.-9. flokk. Skúlaárið 2013/2014 er pláss fyri einum flokki aftrat í 2. árgangi, í hinum árgangunum eru tveir flokkar. Miðalnæmingatalið er 20,4. Aftrat hesum er eitt tilboð 4.-10. flokk fyri 21 næmingar við serligum avbjóðingum.

So sum Venjingarskúlin í dag er skipaður, rúmast ikki forskúli ella frítíðarskúli í skúlabygninginum.

Høvuðsbygningurin hevur tørv á høvuðsumvæling og dagføring til nútíðar undirvísing. Ein høvuðsumvæling uttan aðrar dagføringar er mett til uml. kr. 48 mió.

Mentamálaráðið hevur áður víst áhuga at keypa høvuðsbygningin.

### Sankta Frans skúli

Skúlin varð tikin í nýtslu í 1933, og nakrar umbyggingar hava verið síðan tá. Smábarnaskúlin varð tikin í nýtslu í 2011, og har eru forskúli og frítíðarskúli til forskúlan.

Sankta Frans skúli er tvey sporaður frá forskúlaflokki-7. flokk og við frítíðarskúla til forskúlan.

Skúlaárið 2013/2014 er pláss fyri einum flokki aftrat í fimta árgangi. Í hinum seks árgangunum eru tveir flokkar. Miðalnæmingatalið í flokkunum er 18,9.

Í forskúlanumer næmingatalið 45, næmingarnir eru ávikavist 22 og 23 í flokkunum í forskúlanum.

Sankta Frans skúli hevur eisini tørv á høvuðsumvæling, sum mettur er at kosta uml. kr. 31 mió.

## 3.2. Aðrir skúlar

### Skúlin á Argjahamri

Pláss er fyri munandi fleiri næmingum í Skúlanum á Argjahamri. Ein betri gagnnýtsla av høliskapasitetinum á Argjahamri ávirkar hølistørvin í miðstaðarøkinum. Skúlin á Argjahamri er 7.100 m² til støddar, og hann er tikin í nýtslu í august 2011.

Skúlin er tvey sporaður 1.-9. flokk og hevur frítíðarskúla í skúlabygninginum.

Skúlaárið 2013/2014 er pláss fyri einum flokki aftrat í áttanda árgangi. Miðalnæmingatalið í flokkunum er 18,1. Fyrstu trý árini eru næmingarnir ikki býttir sundur í flokkar, men har næmingatalið í einum árgangi er omanfyri 26, er her roknað við tveimum flokkum.

Tá brúgvin um Sandá er liðug er eyðsýnt, at fleiri næmingar í vesturbýnum kunnu fara í Skúlan á Argjahamri.

### Argja skúli

Sum frammanfyri nevnt er áður skotið upp, at Argja skúli kann hýsa Nám X. Gamli skúlin á Argjum varð tikin í nýtslu í 1952. Nýggi skúlin varð tikin í nýtslu í 1978. Í gamla bygninginum eru hølini smá og ikki í góðum standi, bygningurin er ikki væl egnaður til nútíðar fólkaskúla.

Í nýggja skúlanum eru sjey vanligar skúlastovur umframt nøkur fakhøli, høli til umsiting, lærarastova, fimleikahøll og svimjihylur.

Um nýggi parturin av Argja skúla skal nýtast til Nám X sum varandi loysn, verður neyðugt at gera nakrar tillagingar umframt umvælingar. Skúlin hevur nakað sama

umvælingartørv, sum tann parturin av Hoyvíkar skúla, ið bygdur er samstundis sum Argja skúli, hevur.

## 3.3. Frítíðarskúlarnir

Niðanfyri verður stutt lýst støðan hjá teimum ymsu skúlunum í miðstaðarøkinum í mun til frítíðarskúla. Allir skúlarnir í miðstaðarøkinum hava ikki frítíðarskúla 1.-2. flokk í skúlabygninginum, men eru teir skipaðir uttanfyri skúlabygningin í ymsum fyribilsloysnum.

Eingin neyv kostnaðarmeting fyriliggur um íløgutørv í meira varandi loysn fyri teir frítíðarskúlar, sum eru knýttir til skúlarnar í miðstaðarøkinum, men metast má vera fyrimunur í mun til at tálma samlaða íløgukostnaðin, at skúlaloysn fyri miðstaðarøkið eisini fevnir um frítíðarskúla 0.-2. flokk í skúlabygninginum.

### Frítíðarskúlin Smílibýlið

Í Frítíðarskúlanum Smílibýlinum í Stoffalág ganga næmingar í 1. og 2.flokki í Eysturskúlanum. Smílibýlið heldur til í einum sethúsum, sum kommunan eigur. Smílibýlið rúmar ikki forskúlaflokkum aftrat.

### Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini

Í løtuni ganga næmingar í 1. og 2. flokki í Sankta Frans skúla í Frítíðarskúlanum í Badmintonhøllini. Stundum hava børn úr Kommunuskúlanum eisini gingið í Badmintonhøllini. At frítíðarskúli er í Badmintonhøllini ávirkar ítróttaliga virksemið í høllini, tí tað skal tillagast upplatingartíðunum hjá frítíðarskúlanum.

### Frítíðarskúlin í Sankta Frans skúla

Frítíðarskúlin í Sankta Frans skúla er til teir báðar forskúlaflokkarnar í Sankta Frans skúla. So sum hølini nú eru skipað, rúmast ikki fleiri flokkar.

### Frítíðarstovan í KFUM og Miðstovnurin í Gundadali

Tveir flokkar í Kommunuskúlanum ganga í KFUM, har leigar kommunan høli frá skótunum til frítíðarskúla. Frítíðarskúlin verður rikin sum sjálvsognarstovnur og er tí uttan fyri kommunala leiðslubygnaðin. Hølini eru ikki væl egnaði.

Tveir flokkar í Kommunuskúlanum ganga eisini í frítíðarskúla í Miðstovninum í Gundadali (gamla B36-húsið). Hølini eru ikki í góðum standi, men hevur gott útiøkið. Í heildarætlanini fyri Tórsvøll skal húsið, ið Miðstovnurin er í, rívast niður.

### Frítíðarskúlin í Hornabø og útifrítíðarskúlin Spírin í Havnardali

Næmingar í Venjingarskúlanum eru í Frítíðarskúlanum í Hornabø, sum eru eini sethús, og í útifrítíðarskúlanum Spíranum, sum er í Havnardali. 1. flokkur er í Hornabø, og

næmingarnir í 2. flokki verða við leigaðum bussi koyrdir í Havnardal. Spírin heldur til í felagshølunum hjá Føroya Ríðingafelag, sum frítíðarskúlin og ríðingafelagið eru felags um, og í leigaðum bingjum. Tørvur er á aðrari loysn.

### Samanumtikið frítíðarskúlar

Fyribils frítíðarskúlaloysnirnar í miðstaðarøkinum halda ikki leingi aftrat. Lutvíst fer ein vaksandi hølistørvur í mun til forskúlar at verða ein trupulleiki, lutvíst eru fleiri av hølisloysnunum ikki hóskandi.

Eingin neyv kostnaðarmeting fyriliggur um samlaða íløgutørvin á frítíðarskúlaøkinum.

Hóast ætlanina um, at hølistørvurin hjá frítíðarskúlunum verður loystur saman við skúlaloysnini fyri miðstaðarøkið, so forðar hetta ikki fyri, at skipaðar verða frítíðarskúlaeindir uttanfyri skúlabygningarnar. Sum dømi kundi ein nýbygdur útifrítíðarskúli í Havnardali ella ein ítróttafrítíðarskúli í Gundadali verið skipaðir sum eindir hjá øllum frítíðarskúlunum at skiftast um.

## 4. Uppskot til skúlaloysn fyri miðstaðarøkið

Miðað eigur at verða sum mest eftir, at samlaða skúlaloysnin er framtíðartryggjað bæði í mun til høliskarmar og virksemi, samstundis sum íløgukostnaðurin verður hildin á so lágum støði sum tilber í virðing fyri, at eisini onnur málsøki hjá kommununi at hava íløgutørv.

Hetta kann gerast við betri gagnnýtslu og dagføringum av verandi høliskapasiteti í skúlunum bæði til skúla, forskúla og frítíðarskúla. Neyðugt verður eisini við nýbygging.

Sambært forskúlakunngerðini skal forskúlaflokkur hava tilknýti til ein fólkaskúla og skal húsast undir somu lon sum kommunali skúlin ella eftir serligari skipan við tilknýti til kommunala skúlan.

Har forskúlatilboð ætlandi verða víðkað og tí krevja rúm í skúlunum, eru frítíðarskúlahølini í miðstaðarøkinum í dag skipað í fyribilsloysnum, sum ikki halda leingi aftrat. Mett verður fyrimunur at loysa hølisviðurskiftini hjá frítíðarskúlunum sum part av skúlaloysnini bæði fíggjarliga og fakliga.

Harumframt eigur samlaði høliskapasiteturin á skúlaøkinum at svara betri til tann hølistørv, sum væntast verða komandi 20-30 árini. Tað merkir eina skerjing av verandi høliskapasiteti, sum er ov stórur í mun til veruliga næmingatalið. Fyrimunur er eisini, at tímajáttanin til undirvísing verður gagnnýtt mest møguligt.

Tó eigur samstundis at verða tikið hædd fyri útbyggingarmøguleikum, um so er, at næmingatalið veksur.

Við støði í hesum verða niðanfyri sett upp fýra uppskot til skúlaloysnir fyri miðstaðarøkið. Allar loysnir hava sum fortreyt,

- at samlaða talið av sporum í høvuðsstaðarøkinum lækkar niður í 12 í 1.-7. flokki og 13 spor í 8.-9. flokki, og av hesum eru seks av sporunum 1.-7. flokk og sjey í 8.-9. flokk í miðstaðarøkinum,
- at fleiri næmingar enn higartil úr vesturbýnum skulu ganga í skúla á Argjahamri til tess at fullnýta høliskapasitetin har,
- at Nám X flytur út úr Eysturskúlanum, og
- at Venjingarskúlin verður avhendaður.

Niðanfyri verður hvørt uppskotið lýst og mett í mun til fyrimunir og vansar. Kostnaðarmetingar eru í høvuðsheitum frá 2011.

## 4.1. Uppskot 1

| Skúli | Forskúli | 1.-7. flokkur | 8.-9. flokkur | Frítíðarskúli |
|---|---|---|---|---|
| Eysturskúli | 2 | 2 | 3 | Forsk.fl.-2. fl. |
| Miðbýarskúli | 2 | 2 | 0 | Forsk.fl.-2. fl. |
| Vesturskúli | 2 | 2 | 4 | Forsk.fl.-2. fl. |
| **Spor** | **6** | **6** | **7** | |

*Nám X í Argja skúla*

Í uppskotinum omanfyri verða tvey spor í Eysturskúlanum frá forskúla-7. flokk og trý spor í 8.-9. flokki. Næmingarnir úr teimum smáu bygdaskúlunum og úr Frískúlanum við Hoyvíkstjørn fara í Eysturskúlan, tá teir skulu í 8. flokk. Nám X flytur út úr Eysturskúlanum í Argja skúla. Við hesum verður eisini pláss fyri tveimum sporum til frítíðarskúla til forskúla, 1. og 2. flokk í Eysturskúlanum.

Miðbýarskúlin, sum er samanlegging av Sankta Frans skúla og Kommunuskúlanum, verður í Sankta Frans skúla og í Kongagøtu. Miðbýarskúlin verður ein tvey sporaður skúli frá forskúla-7. flokk. Smábarnaskúlin í Kongagøtu kann vera til forskúla-2. flokk, meðan hinir flokkarnir verða í Sankta Frans skúla.

Við hesi skipan verður pláss fyri frítíðarskúla til forskúla-2. flokk í Miðbýarskúlanum. Neyðugt verður tó við onkrum dagføringum av hølum til frítíðarskúla.

Vesturskúlin verður tvey sporaður frá forskúla-7. flokk, og fýra sporaður í 8.-9. flokki. Næmingar úr Miðbýarskúlanum fara í 8. flokk í Vesturskúlanum.

Umráðandi er, at Vesturskúlin verður bygdur soleiðis, at tað ber til at byggja hann út, um fólkatalið aftur fer at vaksa.

### Fyrimunir

- Allir miðstaðarskúlarnir hava forskúla í skúlanum
- Allir miðstaðarskúlarnir hava frítíðarskúla til forskúla-2. flokk í skúlanum
- 8. og 9. flokkur verða eindir á tríggjar og fýra flokkar – tað gevur størri møguleika fyri fleiri vallærugreinum og betri fakligum umhvørvi
- Vesturskúlin kann byggjast út við einum spori um tørvur er á størri skúlabygnaði, enn framrokningin vísir. Tað ber ikki eins væl til í øðrum skúlum.

### Vansar

- Miðbýarskúlin er ikki í einum skúlabygningi, tó kann forskúli-2. flokk skipast fyri seg og hinir flokkarnir fyri seg.

## 4.2. Uppskot 2

| **Skúli** | **Forskúli** | **1.-7. flokkur** | **8.-9. flokkur** | **Frítíðarskúli** |
|---|---|---|---|---|
| Eysturskúli | 2 | 2 | 5 | Forsk.flokk |
| Kommunuskúli | 0 | 2 | 2 | |
| Sankta Frans skúli | 2 | 2 | 0 | Forsk.flokk |
| **Spor** | **4** | **6** | **7** | |

*Nám X í Argja skúla*

Í uppskotinum omanfyri verða tvey spor í Eysturskúlanum frá forskúla-7. flokk og fimm í 8.-9. flokki. Næmingarnir úr teimum smáu bygdaskúlunum og úr Frískúlanum við Hoyvíkstjørn fara í Eysturskúlan, tá teir skulu í 8. flokk. Sambært hesum uppskotinum fara so haraftrat næmingarnir úr Sankta Frans skúla í Eysturskúlan, tá teir fara í 8. flokk. Nám X flytur út í Argja skúla.

Eingin broyting verður í Sankta Frans skúla. Hann verður framvegis tvey sporaður við næmingum úr forskúla-7. flokk.

Heildarætlanin fyri Kommunuskúlan (uppskotið hjá Árna Winther Arkitektum) verður sett í verk, og skúlin verður so ein tvey sporaður skúli við næmingum í 1.-9. flokk.

### Fyrimunir

- Pláss verður fyri forskúla og frítíðarskúla til forskúla í Eysturskúlanum
- 8.-9. flokkur í Eysturskúlanum verður ein stór eind við møguleikum fyri fleiri vallærugreinum og betri fakligum umhvørvi.

### Vansar

- Pláss verður ikki fyri frítíðarskúla 1.-2. flokk í Eysturskúlanum og Sankta Frans skúla
- Pláss verður ikki fyri forskúla í Kommunuskúlanum
- Pláss verður ikki fyri frítíðarskúla frá forskúla-2. flokk í Kommunuskúlanum
- Eingin fólkaskúli í vesturbýnum
- Við ongum Vesturskúla verður truplari at byggja samlaða skúlabygnaðin út til tess at nøkta hølistørv, um næmingatalið verður hægri enn framrokningin vísir
- Tað ber illa til at leggja Sankta Frans skúla og Kommunuskúlan saman eftir hesi loysn, tí samanlagdi skúlin hevði manglað tvey spor í forskúlanum, og hann hevði haraftrat manglað tvey spor í 8.-9. flokki. Tað merkir, at helvtin av næmingunum, sum fara í 8. flokk, skulu í Eysturskúlan.

### 4.3. Uppskot 3

| Skúli | Forskúli | 1.-7. flokkur | 8.-9. flokkur | Frítíðarskúli |
|---|---|---|---|---|
| Eysturskúli | 2 | 2 | 3 | Forsk.fl.-2. fl. |
| Miðbýarskúli | 3 | 3 | 3 | Forsk.flokk |
| Vesturskúli | 1 | 1 | 1 | Forsk.fl.-2. fl. |
| **Spor** | **6** | **6** | **7** | |

*Nám X í Argja skúla*

Í uppskotinum omanfyri verða tvey spor í Eysturskúlanum frá forskúla-7. flokk og trý spor í 8.-9. flokki. Næmingarnir úr teimum smáu bygdaskúlunum og úr Frískúlanum við Hoyvíkstjørn fara í Eysturskúlan, tá teir skulu í 8. flokk. Nám X flytur út úr Eysturskúlanum í Argja skúla. Við hesum verður eisini pláss fyri tveimum sporum til frítíðarskúla til forskúla, 1. og 2. flokk í Eysturskúlanum.

Miðbýarskúlin, sum er samanlegging av Sankta Frans skúla og Kommunuskúlanum, verður trý spor tilsamans frá forskúla-9. flokk. Fortreyt er, at heildarætlanin fyri Kommunuskúlan verður framd og tillagað til at vera partur av trý sporaðum skúla saman við Sankta Frans skúla. Við hesi skipan verður pláss fyri frítíðarskúla til forskúlan, men ikki fyri frítíðarskúla til 1.-2. flokk.

Vesturskúlin verður ein einsporaður skúli frá forskúla-9. flokk.

#### Fyrmunir

- Eysturskúlin fær pláss bæði fyri forskúla og frítíðarskúla frá forskúla-2. flokk
- 8.-9. flokkur í Eysturskúlanum verður ein stór eind við møguleikum fyri fleiri vallærugreinum og betri fakligum umhvørvi
- Miðbýarskúlin verður stór eind við trimum sporum – tað gevur størri møguleika fyri fleiri vallærugreinum og betri fakligum umhvørvi
- Vesturskúlin fær pláss fyri forskúla og frítíðarskúla frá forskúla-2. flokk
- Vesturskúlin kann byggjast út við einum spori um tørvur er á størri skúlabygnaði, enn framrokningin vísir. Tað ber ikki eins væl til í øðrum skúlum.

#### Vansar

- Miðbýarskúlin hevur ikki pláss fyri frítíðarskúla til 1.-2. flokk
- Miðbýarskúlin verður í fleiri bygningum
- Vesturskúlin við einum spori er ov lítil eind.

## 4.4. Uppskot 4

| Skúli | Forskúli | 1.-7. flokkur | 8.-9. flokkur | Frítíðarskúli |
|---|---|---|---|---|
| Eysturskúli | 2 | 2 | 3 | Forsk.fl.-2. fl. |
| Sankta Frans skúli | 2 | 2 | 0 | Forsk.flokk |
| Vesturskúli | 2 | 2 | 4 | Forsk.fl.-2. fl. |
| **Spor** | **6** | **6** | **7** | |

*Nám X í miðbýin*

Í uppskotinum omanfyri verða tvey spor í Eysturskúlanum frá forskúla-7. flokk og trý spor í 8.-9. flokki. Næmingarnir úr teimum smáu bygdaskúlunum og úr Fírskúlanum við Hoyvíkstjørn fara í Eysturskúlan, tá teir skulu í 8. flokk. Nám X flytur út úr Eysturskúlanum í miðbýin við Kongagøtu. Við hesum verður eisini pláss fyri tveimum sporum til frítíðarskúla til forskúla, 1. og 2. flokk í Eysturskúlanum.

Í miðbýnum verður Sankta Frans skúli. Har verður eingin broyting, hann verður ein tvey sporaður skúli frá forskúla-7. flokk, og frítíðarskúli til forskúlan verður framvegis í skúlanum.

Nám X verður ein miðbýarskúli til 10. flokk. Hølini til Nám X verða Smábarnaskúlin í Kongagøtu og Gamli Realskúlin. Haraftrat verður bygdur ein nýggjur bygningur í garðinum hjá Frk. Cohr til fakhøli og verkstøð.

Vesturskúlin verður tvey sporaður frá forskúla-7. flokk, og fýra sporaður í 8. og 9. flokki. Næmingar úr Sankta Frans skúla fara í 8. flokk í Vestuskúlan.

### Fyrimunir

- Nám X í miðbýnum fer at seta sín dám á miðbýin – hetta eru hálvvaksnir næmingar, sum síggjast aftur í býarmyndini. Í miðbýnum liggur skúlin høgliga fyri, tá hugsað verður um bókasavn, leikhús, spælistøð, fyritøkur, stovnar o.s.fr. Teirra skúladagur er eisini meira uttanfyri sjálvan skúlan.
- Eysturskúlin fær pláss bæði fyri forskúla og frítíðarskúla frá forskúla-2. flokk
- 8. og 9. flokkur verða eindir á tríggjar og fýra flokkar – tað gevur størri møguleika fyri fleiri vallærugreinum og betri fakligum umhvørvi
- Vesturskúlin kann byggjast út við einum spori um tørvur er á størri skúlabygnaði, enn framrokningin vísir. Tað ber ikki eins væl til í øðrum skúlum.

### Vansar

- Sankta Frans skúli hevur ikki frítíðarskúla til 1.-2. flokk

### 4.5. Kostnaðarmetingar

Í sambandi við omanfyri nevndu uppskot, so er lutvíst talan um neyðugar íløgur í nýbygging og íløgur í høvuðsumvælingar av verandi skúlabygningum.

Tá E-lonin á Eysturskúlanum er liðug høvuðsumvæld á sumri 2014, er allur bygningurin høvuðsumvældur. Í mun til at fyrireika frítíðarskúla í Eysturskúlanum skal roknast við smærri útreiðslum til tillagingar.

Sankta Frans skúli hevur ein høvuðsumvælingartørv fyri framman, og sum mett er kostar umleið 31 mió kr.

At fremja heildarætlanina fyri Kommunuskúlan er mett at kosta umleið 120 mió kr.

At byggja nýggjan Vesturskúla er tengt at, hvussu stórur hann er. Um skúlin er við tveimum sporum forskúla-7. flokk, fýra sporum 8.-9. flokk og hevur frítíðarskúla, er ein kostnaður uppá 180 mió kr. á eini leið, um støðið er ein bygging sum á Argjahamri. Metast má skilagott at kanna, um til ber at byggja einklari og bíligari. Inntøka av møguligari sølu av skúlum sum part av varandi skúlaloysn fyri miðstaðarøkið, er ikki drigin frá nevndu upphædd.

Argja skúli hevur, eins og Hoyvíkar skúli, sum er bygdur samstundis, ein høvuðsumvælingartørv um ikki so langa tíð. Um Nám X flytur út í Argja skúla, kann roknast við umvælingartørvi fyri uml. 15-20 mió kr.

Um Nám X flytur inn í miðbýin við Kongagøtu, er roknað við tørvi á nýbygging fyri umleið 25 mió kr.

Í teim førum, har tillagingar skulu gerast í verandi skúlar at fyrireika forskúla og frítíðarskúla, kann roknast við ávísum útreiðslum.

Í teim førum, har skúlaloysnin hevur við sær, at frítíðarskúli er ikki í skúlabygninginum, skal roknast við íløgukostnaði til frítíðarskúlar, tí fleiri av verandi frítíðarskúlaloysnum eru ikki haldbærar. Eingin neyv kostnaðarmeting fyriliggur um, hvat ein sjálvstøðugur fríðarskúli kostar, men fermetraprísur er at sammeta við skúla- og dagstovnabygging.

### 4.6. Samanumtøka

Omanfyri eru sett fýra uppskot upp til skúlaloysn fyrst og fremst fyri miðstaðarøkið.

Dentur er lagdur á, at loysnin er framtíðartryggjað bæði í mun til íløgur og rakstur. Hetta merkir, at bygnaðurin ella høliskapasiteturin skal ikki vera ov stórur, men hinvegin vera lættur av vaksa um, verður ein størri tilgongd av næmingum í mun til í dag og tað, sum framrokningarnar vísa.

Tørvur er á fleiri forskúlum, og tí er dentur eisini lagdur á at skipa forskúlar í øllum skúlum, eisini til tess at verða fyrireikað í mun til hølir, um løgtingið lækkar undirvísingarskylduga aldurin úr 7 árum niður í 6 ár. Á sama hátt er dentur lagdur á, at frítíðarskúlaskipanin fær betri karmar og í skúlunum.

Uppskot 1 og uppskot 4 lúka best hesi krøv til skúlaloysn.

## 5. Verkseting

Hvussu ítøkiliga verksetingin av nýggjum skúlabygnaði fyri miðstaðarøkið verður, er tengt at, hvør endaliga loysnin verður. Tíðarætlanin hongur eyðsæð saman við íløgunum, sum samtyktar verða til loysnina.

Niðanfyri verður tí lýst meira alment, hvørji atlit skulu takast, og hvussu ein broytingartilgongd kann skipast.

### Skúlastýrini hoyrast

Sambært fólkaskúlalógini § 52, stk. 3 viðger skúlastýrið saman við kommunustýrinum uppskot um skúla-bygging/- umbygging. Í teimum kommunum har tvey ella fleiri skúlastýri eru, velur kommunustýrið ein arbeiðsbólk at viðgera uppskot um skúlabygging/umbygging, smb. § 57, stk. 4.

Sambært fólkaskúlalógini § 52, stk. 4 viðger skúlastýrið saman við kommunustýrinum uppskot um skúlabygnað og broytingar í honum. Í teimum kommunum har tvey ella fleiri skúlastýri eru, velur kommunustýrið ein arbeiðsbólk, umboðandi øll skúlastýrini, at viðgera uppskot um skúlabygnað, smb. § 47, stk. 6.

Í uppskotinum er talan um broytingar í skúlabygnaðinum fyri teir fýra skúlar Eysturskúlan, Kommunuskúlan, Sankta Frans skúla og Venjingarskúlan, sostatt skulu skúlastýrini í hesum skúlum verða hoyrd og hava møguleika at gera viðmerkingar til uppskotið.

### Innskriving

Tá skúlakapasiteturin í miðstaðarøkinum verður lækkaður við tveimum flokkum í hvørjum árgangi, verður neyðugt at taka atlit at hesum í innskrivingini í fyrsta flokk. Hetta kann gerast til næstu innskriving í januar 2014.

Hetta krevur eina meira stýrda innskriving eitt nú í mun til partar av vesturbýnum, sum skulu innskrivast í Skúlan á Argjahamri. Hetta hevur sostatt avleiðingar fyri fría valið av skúla, sum verður skert.

### Flokkar

Neyðugt verður at leggja nakrar flokkar saman. Hetta kann gerast við at upploysa allar flokkar, sum verða ávirkaðir av skipanini, og so blanda kortini av nýggjum. Sostatt verða tað ikki bara næmingar, sum fara í annan skúla enn tann, teir hava gingið í, sum fara í ein nýggjan flokk, men allir byrja í nýggjum flokki. Hetta verður gjørt í Eysturskúlanum, tá næmingar skulu úr 7. flokki í 8. flokk í sambandi við, at fleiri næmingar koma úr øðrum skúlum og talið av flokkum vanliga hækkar við einum spori fyri árgangin.

### Samanleggja skúlar

Í sambandi við eina møguliga samanlegging av skúlum verður neyðugt at fyrireika hetta í samstarvi við Mentamálaráðið. Loysn skal finnast á, hvussu leiðslan verður skipað við eini samanlegging.

Sambært § 25 stk.2 í kunngerðini um at velja foreldraumboð og kommunustýrisumboð í skúlastýri, kann kommunustýrið, tá skúlar verða lagdir saman í valskeiðnum, gera av, at foreldraumboðini frá skúlunum arbeiða saman, til nýval hevur verið.